## Kundi verið betri



Í morgun stóð Patrick Robb úr Arbroath í Skotlandi og bíðaði eftir at sleppa heim til Skotlands. Hann kom til Føroya týsdagin, og sum eitt tað fyrsta keypti hann sær eina føroyska landsliðstroyggju. Hesari hevur hann gingið í síðani, saman við ternuttum kilti og tilhoyrandi svørtum jakka. Ein prýðiligur búni til unga mannin. Í gjárkvøldið var hann á Svangaskarði og fylgdi hetjum sínum úr heimlandinum. – Dysturin var frálíkur, men skotska liðið kundi gott spælt betri, heldur Patrick Robb, sum nú komin heimaftur til Skotlands.

## Svøríki bukaði Ísland

Íslendingar vóru fyri einum ordans umgangi, tá teir vórðu sendir heim úr Svøríki við einum svíðandi 5-0 tapi. Svøríki kom tíðlig á odda við máli frá Marcus Allbäck, men eina løtu royndi Ísland at vinna seg aftur. Tað gekk tó heilt galið stutt fyri steðgin, tá Anders Svensson og Olof Mellberg øktu til 2- og 3-0. Og eftir steðgin kundu Marcus Allbäck og Marcus Rosenberg negla tveir seymir afturat í íslendsku kistuna.

# – Hava uppiborið eina sensatión

**– Tað var stong út hjá okkum, og hjá teimum fór hann inn, staðfestir Mikkjal Thomassen, sum heldur at føroyska liðið hevur uppiborið eina sensatión nú**

LANDSDYSTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Sum eg áður havi sagt, so eru ymsir mátar at tapa upp á, og í dag tapa vit, tí vit eru óhepnir og ikki tí, at vit eru verri enn teir, sigur Mikkjal Thomassen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Eg eri yvirhøvur ikki nøgdur við tapið, tí vit hava so sanniliga marginalarnar í móti okkum. Vit hava líka nógvar kjansir sum teir, um ikki fleiri, men hjá okkum var tað stong út, meðan tað hjá teimum fór inn, segði heldur hugtungi Mikkjal Thomassen beint eftir dystin.

– Men sum eg áður havi sagt, so eru ymsir mátar at tapa upp á, og í dag tapa vit, tí vit eru óhepnir og ikki tí, at vit eru verri enn teir.

Mikkjal heldur sjálvur, at stórur munur var á avrikinum hjá føroyska liðnum fyri og eftir steðgin. Ein av orsøkunum er, at dysturin leygardagin framvegis sat tungt í beinunum, tá dysturin móti skotum byrjaði.

– Tað er eingin ivi um, at tað er tað. Tað kunnu vit ikki fornokta, og sjálvt um vit geva okkum alt vit kunna, so hava vit ikki heilt somu kreftir, vísir Mikkjal á og tekur so stutt saman um dystin:

– Vit hava ilt við at koma í gongd, hava ringt við at fóta okkum, og megna ikki at savna okkum fyrr enn í steðginum. Har siga vit við okkum sjálvar, at hetta kunnu vit ikki standa model til, tí vit vita, at vit kunnu betur enn tað, vit vístu, og eg haldi at vit reisa okkum flott.

Mikkjal Thomassen er sostatt ógvuliga beiskur um ósigurin, og heldur hann, at føroyska liðið hevur uppiborið meira.

– Vit hava veruliga uppiborið at skapa eina sensatión við hesum liðnum, tí tað er so gott. Tí iðri eg meg eisini um, at vit ikki koma í gongd beinanvegin í dystinum, segði Mikkjal Thomassen beint eftir tepra tapið fyri skotum.

# Fýra vórðu skiftir

**Hóast fína úrslitið ímóti Italia, hevði landsliðsvenjarin upp undir avbjóðingina ímóti Skotlandi framt fýra broytingar í uppstillingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin spældu Føroyar fínan dyst ímóti italsku heimsmeistarunum. Kortini hevði Jógvan Martin Olsen gjørt av at seta tveir spælarar av og at broyta uppstillingina á fýra plássum undan avbjóðingini ímóti Skotlandi í gjár.

Sum tað varð nevnt í blaðnum seinnapartin í gjár og á portalinum stutt eftir døgurða, so valdi Jógvan Martin at seta Fróða Benjaminsen í miðverjuna fyri Jón Róa Jacobsen. Superligu spælarin var so fluttur á vongverjan í høgru, og Atli Danielsen varð fluttur á vongverjan í vinstru.

Harvið varð Marni Djurhuus ofraður. Við Útvarpið stutt undan dystarbyrjan segði venjarin, at broytingin gav seg sjálva, tí Marni Djurhuus hevði boðað frá, at hann ikki var førur fyri at spæla.

Eftir hendiligan samanstoyt við Rógva Jacobsen í sambandi við skotskt hornaspark fór Óli Johannesen av vøllinum at fáa viðgerð. Átta minuttir seinni kom Óli aftur á vøllin, men tá bað hann skjótt um at verða útskiftur. Tá fór Jón Rói í miðverjuna, Atli á høgra vongverja, og Marni var nóg birgur at seta á vinstra vongverjan.

Jákup Mikkelsen varð fyri fyrstu ferð liðformaður, tá ið Óli Johannesen var farin út.

Venjarin hevði gjørt av undan dystarbyrjan, at Christian Lamhauge skuldi fáa møguleikan á toppinum í staðin fyri Andrew av Fløtum.

Í 2. hálvleiki varð innskifti Marni Djurhuus útskiftur við Símun Samuelsen. Tað vil siga, at tá ið alt kom til alt, var Marni førur fyri at spæla.

## Søgulig útskifting

**Fyri fyrstu ferð var føroyskur spælari skiftur bæði inn og út í undankappingardysti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð í undankappingardysti varð ein føroyskur spælari bæði skiftur inn og skiftur út í sama dysti. Marni Djurhuus varð skiftur inn, tá ið Óli Johannesen fór av vøllinum í 36. minutti. Tá ið venjarin í 2. hálvleiki gjørdi av at spenna álopsbogan uppaftur meiri, varð Marni Djurhuus skiftur út aftur. Í 77. minutti kom Símun Samuelsen á vøllin fyri hann.

Tað kemur ikki ofta fyri, at innskiftur spælarin verður útskiftur. Í altjóða skrásettum vinarlandsdystum fyri Føroyar er tað komið tvær ferðir fyri.

Fyrra ferðin var í 1989, tá ið Kanada vann 1-0 á Føroyum í Klaksvík. Ta ferðina varð Jógvan Petersen í B68 bæði skiftur inn og út. Hann loysti Gunnar Mohr úr HB av í 32. minutti, og í 62. minutti varð Kurt Mørkøre úr KÍ settur á vøllin fyri Jógvan Petersen.

Seinna ferðin var í vinardystinum á Svangaskarði ímóti Noregi 11. august í 1993. Ta ferðina varð Páll á Reynatúgvu úr B71 settur á vøllin í 23. minutti, tá ið hann loysti Jon Johannesen úr TB av. Í 73. minutti varð Páll á Reynatúgvu skiftur út aftur. Tá kom Eyðfinn Olsen úr B68 á vøllin.